# Ársfrágreiðing 2020

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamálið hjá Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun - uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsitingina hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum, samsvarandi vinnupolitikki Landstýrsins, staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyrinevnda virksemi, røkir Vinnuframi umsiting og játtan hjá Filmshúsinum, umsiting og játtan hjá Tónleikaútflutningsstovuni, játtan hjá Íverksetarahúsinum og stuðulsskipan til skipasmíð. Vinnuframi eigur og rekur eisini bygningin á Hoyvíksvegi 51, Tórshavn, sum verður leigaður út til granskingarparkina iNOVA. Skrivstovan hjá NATA, North Atlantic Tourist Association, húsast hjá Vinnuframi.

## Árið 2020

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla ráðgeving, menning og sølu í 2020.
Harafturat hevur Vinnuframi stuðlað verkætlanum undir nýggju stuðulsskipanini, sum varð stovnað í 2020. Fyribils er heitið á hesi stuðulsskipan, Heildarverkætlanir og Serstøk Vinnuframaátøk. Nýggja stuðulsskipanin letur upp fyri, at fleiri aktørar í vinnuni saman kunnu søkja um stuðul. Til dømis um fleiri aktørar innan eina ávísa vinnugrein sláa seg saman at gera eitt søluátak, ella luttaka saman á einum sølutiltaki uttanlands. Tað kann eisini vera eitt áhugalíknandi felag, hvørs endamál er at betra um atgongdina til marknaðin hjá fleiri aktørum innan eina vinnugrein. Vinnuframaskipanin kann eisini nýta stuðulsskipanina til tiltøk, sum stimbra, hugkveikja og førleikamenna íverksetarar og vinnulívið sum heild.

Vinnuframi hevur í 2020, umframt kjarnuøkið í grunninum, umsitið skipasmiðjustuðul og havt ábyrgd av játtanini og umsitingini hjá Filmshúsinum og Tónleikaútflutningsstovuni. Harumframt, hevur Vinnuframi ábyrgd av játtanini hjá Íverksetarahúsinum.

Í desember 2019 flutti skrivstovan hjá NATA frá Vinnuhúsinum inn á skrivstovuna hjá Vinnuframa. Endamálið hjá NATA er at fremja samstarvið innan ferðavinnu millum Grønland, Ísland og Føroyar. NATA veitir stuðul til samstarvsverkætlanir innan ferðavinnumenning og -marknaðarføring og ferðastuðul til skúlar, ítróttarútferðir og mentanarliga útveksling.

Granskingarparkin iNOVA leigar bygningin hjá Vinnuframa á Hoyvíksvegi 51. Vinnuframi hevur ábyrgd av at røkja bygningin og at gera ábøtur og umvælingar. Nýggjur leigusáttmáli varð undirskrivaður í 2020, har ein sámulig húsaleiga fyri næstu fimm árini varð ásett.
Í 2011 varð Løgtingslóg nr. 59 frá 26. mai 2011, um at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframa til at innrætta høli til granskingarsetur, viðtikin. Bygningurin hjá Vinnuframa varð í 2012 umbygdur til endamálið fyri umleið 10 mió. kr. Starvsstovutól fyri umleið 6,6 mió. kr. vórðu eisini fíggjað við stovnsfæi frá Vinnuframa.
iNOVA leigar í dag út til vinnufyritøkur og almennar stovnar, sum hava atgongd til skrivstovuhøli og nútímans starvsstovur og starvsstovutól. Eisini kunnu fyritøkur, granskarar og privat fólk leiga køkin, ið er løggildaður av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eitt stórt høli, Høllin, verður leigað út til kanningarstovuna Thetis Sp/f, sum byrjaði nýtt virksemi innan koronakanningar í 2020.

Vinnuframi hevur verið eygleiðari á fýra nevndarfundum hjá Nordic Innovation í 2020. Allir fundirnir eru farnir fram á Zoom orsakað av koronafarsóttini.

Vinnuframi hevur verið National Contact Point fyri Horizon 2020 SME Instruments, sum er ein ES stuðulsskipan til smáar og miðalstórar fyritøkur og National Contact Point fyri Horizon 2020 ICT, sum er ein ES stuðulsskipan til loysnir innan kunningar- og samskiftistøkni. Í hesum sambandi hevur Vinnuframi havt tætt samstarv við Granskingarráðið, sum hevur havt ábyrgdina av føroysku avtaluni við ES um Horizon 2020 stuðulsskipanirnar.
Avtalan ímillum Føroyar og ES um Horizon 2020 fór úr gildi í endanum av árinum.
Politiska skipanin viðger í løtuni, um Føroyar skulu luttaka í nýggju ES stuðulsskipanini, Horizon Europe, sum byrjar í 2021.

Árið hevur verið merkt av koronafarsóttini. Øll tiltøk, sum vórðu løgd til rættis fyri 2020, vórðu avlýst vegna korona. Sum dømi kann nevnast stórsligna tiltakið, Patent & Copyright, sum skuldi

verða í Kongshøll 19. mars. Patent fyllir nógv hjá íverksetarum, sum uppfinna eina vøru. Teir vilja verja teirra framleiðslu. Royndir vísa tó, at tað kann verða sera dýrt at fáa sær patent, og at tað, í nógvum førum, er óvist, hvussu vardur uppfinnarin í veruleikanum er. Hjá films- og tónleikaframleiðarum er tað týdningarmikið at kenna til síni rættindi viðvíkjandi copyright. Tiltakið varð lagt til rættis í samstarv við Framtak, Íverksetarahúsið, Hugskotið, Tónleikaútflutningsstovuna og Filmshúsið. Fleiri áhugaverdir útlendskir serfrøðingar og royndir føroyskir íverksetarar vóru bodnir at greiða frá um trupulleikar og møguleikar við patenti og copyright. Alt var klárt, tá Føroyar lótu aftur 12. mars 2020. Ætlanin er, at tiltakið fer av bakkastokki, so skjótt sum koronastøðan loyvir tí.
Tiltak fyri íverksetarar um fígging og eitt tiltak á Christiansborg um fíggingarmøguleikar í Danmark varð eisini avlýst.

36 umsóknir vórðu viðgjørdar í í 2020 í mun til 61 umsóknir í 2019. Søkt varð um tkr. 7.515 í 2020 í mun til tkr. 8.793 í 2019.
Í stuðli vórðu í 2020 játtaðar tkr. 3.089 í mun til tkr. 2.443 í 2019. Afturførdur stuðul var tkr. 275 í 2020.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vórðu tkr. 525 í 2020 í mun til tkr. 1.420 í 2019. Upprunaliga var ætlanin, at raksturin hjá Vinnuframa í stóran mun skuldi verða fíggjaður við rentuinntøkunum av stovnsfænum. Rentugongdin hevur tó generelt verið lækkandi seinastu árini og virðisbrævamarknaðurin er sera óstøðugur. Hetta hevur stóra ávirkan á árliga tøka peningin til stuðul.

Tøki peningurin var tkr. 30.045 við árslok í 2020, meðan játtaður, ikki útgoldin stuðul, var tkr. 3.148. Meginparturin av tøka peninginum stendur í Landsbankanum, sum setir pengarnar í virðisbrøv. Orsøkin er, at renta av innistandandi í peningastovninum er negativ.

Koronafarsóttin hevur havt stóra ávirkan á gongdina í verkætlanunum. Tær flestu steðgaðu meira ella minni upp. Vinnuframi hevur tí longt freistirnar á flestu verkætlanunum.

Vinnuframi er einasti grunnur í Føroyum, ið kann játta stuðul til allar vinnugreinar, og umsóknir um stuðul verða viðgjørdar á stýrisfundi átta til níggju ferðir um árið. Áhugin fyri at søkja um stuðul er stórur, bæði hjá íverksetarum og meira etableraðum fyritøkum. Játtanin hjá Vinnuframa er 3,2 mió.

kr. og hon fylgir ikki við gongdini í samfelagnum og tørvinum á figging. Tískil er talan um fleiri góðar verkætlanir, sum stýrið ikki kann ganga á møti. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri menning og nýskapan í Føroyum.

## Framtíðin

Í 2021 fer Vinnuframi at leggja dent á at stuðla verkætlanum innan ráðgeving, menning og sølu, samstundis, sum nýggja stuðulsskipanin Heildarverkætlanir og Serstøk Vinnuframaátøk eisini kann fáa ein part av stuðulinum.

Í viðgerðini av umsóknum um stuðul, verður dentur lagdur á, at verkætlanirnar hava eitt toymi við hóskandi førleikum, sum kann tryggja, at eitt búskaparligt burðardygt virksemi við vakstrar- og útflutningsmøguleikum kann fremjast. Tað er ein fyrimunur, um verkætlanin hevur jaliga ávirkan á vinnulívið sum heild í Føroyum.

Samstarvið millum stovnarnar í vinnuframaskipanini er ein fyrimunur fyri íverksetararnar. Møguleiki er fyri at gera størri tiltøk fyri bæði smáar og stórar aktørar í vinnuni. Ætlanin er, at tiltøkini, sum vórðu avlýst í 2020, verða hildin í 2021.

Fyri at fylgja upp upp á verkætlanirnar, fer Vinnuframi at vitja fyritøkur, sum eru komnar á mál við teirra verkætlan. Samstundis verða smá videobrot av virkseminum framleidd og løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuframa.

## Verkætlanir frá 2020

Niðanfyri sæst ein lýsing av fýra av teimum 28 verkætlanunum, sum fingu stuðul játtaðan í 2020. Fleiri áhugaverdar verkætlanir eru játtaðar í árinum. Sum nevnt omanfyri, eru flestu verkætlanirnar tó ikki komnar á mál orsakað av koronafarsóttini.

**Verkætlan 1**

Umsøkjari: MARKA Fa

Verkætlanin í stuttum: "Á ferð við eini bóndadóttir". Ráðgeving til talgilt marknaðarátak av dagstúrum til Oyrareingjagarð við ferðaleiðarum/mati og fysisku vørurnar, taska og regnskjól, fyri at náa út til ferðafólk, fyritøkur og føroyingar sum heild.

Endamál: Íblásturin til MARKA kemur frá seyðabrævinum. Við søgufrágreiðing úr Seyðabrævinum og garðinum, fer MARKA at greiða frá seyðahaldi, rakstri, søguligum støðum í haganum, og hvussu garðurin hevur verið partur av forkunnugum vitjanum og hendingum gjøgnum tíðina. Taskan og regnskjólið skal knýta markini, garðin og vøruna, saman. Endamálið er at náa út til fleiri málbólkar, skúlar, barnagarðar og ferðafólk gjøgnum ferðaskrivstovur.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 04 Søla.

Úrslit: Arbeiðið at marknaðarføra MARKA-konseptið "Á ferð við eini bóndadóttir" er væl og virðiliga skotið í gongd. Ráðgevari hevur saman við fyritøkuni MARKA orðað eina marknaðarføringsstrategi. Eisini hevur fyritøkan fingið ráðgeving í, hvussu leggjast skal út á sosialar miðlar. Í hesum sambandi eru professionellar myndir tiknar av vaksna- og barnatúrum. MARKA metir seg hava fingið nógv burturúr stuðlinum. Mett verður, at tað er ein stórur fyrimunur, at yrkisfólk standa aftanfyri strategi, tekst og myndir, og MARKA sær øktan áhuga bæði á Facebook og Instagram.

**Verkætlan 2**

Umsøkjari: Tøkni Sp/f

Verkætlanin í stuttum: Talgilt amboð at skriva dygdargóðar Horizon Europe umsóknir í felag.

Endamál: Endamálið er at gera eitt talgilt amboð, ið styðjar granskarum og stovnum, sum ynskja at skriva dygdargóðar umsóknir til Horizon Europe verkætlanir í felag. Samstundis er ynskiligt at brúka amboðið til at styrkja førleikan hjá føroyskum stovnum og feløgum at virka og at tað gongst teimum væl í Horizon Europe skipanini, har kappingin um peningin er stór.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 03 Menning.

Úrslit: Talgilda skipanin, Proposal Pot, er ment til at stimbra samstarvandi umsóknarskriving til Horizon Europe verkætlanir. Mitt í greiningartilgongdini fekk Tøkni fyrispurning frá NORA um at veita tøkni til netborna tiltakið North Atlantic Corona Challenge 2020. Proposal konseptið varð í hesum sambandi víðka til eisini at fevna um uppseting av útbjóðing (calls), innlating av umsóknum (submissions) og meting av umsóknum (jury evaluation).
Proposal Pot skipanin var klár at brúka til tiltakið hjá NORA 29. – 31. mai 2020, og bæði tiltakið og nýtslan av amboðnum eydnaðist sera væl. Tøkni kann nú bjóða kundum eitt amboð, sum kann brúkast bæði til tiltøk og til aðrar umsóknar- og tilboðskrivingartilgongdir. Tøkni heldur fram við menningararbeiðinum, so tað kann brúkast til vanliga innlating og viðgerð av umsóknum og tilboðum.

### Verkætlan 3
Umsøkjari: Nomatek P/F

Verkætlanin í stuttum: Menning av útgerð til fráfiltrering av slammi frá slammvatninum, sum rennur frá smoltstøðum. Fráfiltreraða slammið kann millum annað nýtast til biogass.

Endamál: Endamálið er at menna eitt bandfiltur, sum kann fráfiltrera slammið, og hava møguleika fyri at stilla konsentratiónina av suspenderaðum turrevn í fráfiltreraða slamminum. Hetta skal kunna nýtast bæði til smoltstøðir og til aðrar filtreringsuppgávur.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 03 Menning

Úrslit: Skipanin riggar væl og Nomatek hevur framleitt fleiri nýggj bandfiltur til marknaðin, og millum annað fingið bílegging úr Íslandi. Nýggju bandfiltrini eru broytt út frá menningini og úrslitinunum frá prototypuni.
Ein stórur partur av virkseminum hjá Nomatek hevur tey síðstu 10-20 árini verið vatnviðgerð, bæði reint vatn og spillvatn. Tað er ein vaksandi tørvur, bæði í Føroyum og aðrastaðni, og hendan verkætlanin kemur at verða við til at menna virksemið hjá Nomatek innan hetta økið.

## Verkætlan 4

Umsøkjari: Símun Jóhan Wolles

Verkætlanin í stuttum: Marknaðarførsla av appini ”Receipt Manager”, fyrst og fremst á sosialum miðlum.

Endamál: Verkætlanin er í sambandi við eina app, sum er í gerð. Appin “Receipt Manager” kemur at lætta um, tá starvsfólk skulu goyma kvittanir og/ella skulu telja, hvussu nógvar kilometrar, tey hava koyrt. Í sambandi við arbeiðsørindi, verður túrur (skjal) stovnaður í appini. Síðani kunnu kvittanir og rutur leggjast inn í skjalið, sum kann sendast beinleiðis til arbeiðsplássið við telduposti umvegis appina.
Endamálið er at gera tilfar og marknaðarføra appina á týðandi sosialum miðlum, her ímillum LinkedIn, og beinleiðis gjøgnum teldupost og telefon. Arbeiðast skal eisini fram ímóti betri SEO Score.

Stuðul: Stýrið játtaði í 2020 stuðul sambært stuðulsskipanini 04 Søla.

Úrslit: Lýsingartilfar varð gjørt og lagt út á sosialar miðlar, millum annað á LinkedIn, har netverkið eftirfylgjandi vaks munandi. Lýsingarátakið á sosialu miðlunum økti munandi um áhugan hjá málbólkinum. Í hesum sambandi varð ein bílig og einkul heimasíða ment, sum eigarin lætt kann menna víðari sjálvur. Tað vísti seg, at marknaðarføringin á portal.fo og dimma.fo og útvarpssamrøðan við Símun Jóhan Wolles í Góðan Morgum Føroyum gav sera góð úrslit, væl betri enn roknað varð við.
Símun Jóhan Wolles hevur lært sera nógv av verkætlanini. Í løtuni verður appin, Receipt Manager, ment víðari, samstundis sum ein meira málrættað marknaðarføringinsætlan verður løgd til rættis.

# Hagtøl







| Kr. 1.000 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgeving | 90 | 517 | 939 | 287 | 465 | 605 |
| Menning | 1.973 | 459 | 1.108 | 2.444 | 915 | 1.1810 |
| Søla | 620 | 1.467 | 483 | 919 | 1.252 | 950 |
| Heildarverkætlanir | 407 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Í alt | 3.090 | 2.443 | 2.530 | 3.650 | 2.632 | 3.365 |

